## NØVN Í VIKUNI

# Jóhan Petur Olgarsson 40



Seinasta leygarkvøld var veitsla í Ítróttarhøllini í Trongisvági. Orsøkin til hátíðarhaldið var at TB´arin og postmaðurin á Tvøroyri, Jóhan Petur Olgarsson, hevði fylt 40 ár tann 29. januar. Jóhan Petur hevur verið virkin TB´ari í eini 30 ár. Hann hevur verið nevndarlimur, formaður í ungdómsnevndini og venjari hjá ungdómsliðunum, umframt at hann eisini skipar fyri dansi í TB húsinum í vikuskiftunum. Síðan 1978 hevur Jóhan Petur arbeitt hjá Postverki Føroya sum postmaður á Tvøroyri.

**m.g.**

# Tórleiv Clementsen settur sum servicemaður hjá Kone A/S




Havnarmaðurin Tórleiv Clementsen, ið býr í Hósvík, er settur í starv sum servicemaður hjá Kone A/S í Føroyum. Kone hava umleið 90 prosent føroyska marknaðinum fyri lyftir.

Eftir at Keld Thorsen frá Kone A/S í Danmark, ið hevur ferðast til Føroya seinastu 30 árini, fer frá við eftirløn, hevur fyritøkan nú tikið stig til at hava egna deild í Føroyum.

Tórleiv Clementsen, ið er útbúgvin elektrikari, hevur búð í Danmark í 7 ár. Harav arbeiddi hann í 3 ár við lyftum. Hann hevur verið á skeið hjá Kone A/S í Danmark, og tekur hann øll tey skeið, sum arbeiðseftirlitið krevur. Í sambandi við at Keld Thorsen fer frá, og Tórleiv Clementsen er settur sum servicemaður fyri Føroyar, verður móttøka á Hotel Hafnia í dag, 7. februar, frá kl. 13-16. Kone A/S heldur til á Vørðuvegi 7 í Hósvík.

**m.g.**






# Húsavørðurin hjá Postverkinum 40 ár



2. februar bleiv húsavørðurin hjá Postverkinum, John M. Danielsen, 40 ár. John er føddur og uppvaksin á Tvøroyri. Hann er útbúgvin timburmaður, og hevur hann arbeitt sum timburmaður bæði í Føroyum og uttanlanda. Síðan 1995 hevur John, sum í dag býr í Havn, arbeitt hjá Postverki Føroya, fyrst í brævsorteringini og seinnu árini sum húsavørður. John er kanska best kendur sum "Hin ið altíð veit eina góða skemtisøgu".

**m.g**


## Leiðarar til nýggju Norrönu

*Søkt verður eftir dugnaligum deildarleiðarum til matstovur, handlar og reingerð um borð á nýggju Norrönu.*

**Restaurant Manager**
Restaurant Manager hevur ábyrgdina av matstovum og barrum. Hann skal vera útbúgvin tænari ella hava samsvarandi royndir. Tað áliggur matstovuleiðaranum at tryggja ferðafólkunum tænastu á høgum altjóða stigi.

**Shop Manager**
Shop Manager hevur ábyrgdina av gávuhandlinum, parfumuhandlinum og kioskini. Hann skal vera útbúgvin innan handil ella hava samsvarandi royndir. Handilsleiðarin skal tryggja eitt høgt altjóða tænastustig í handlunum umborð.

**Chief Housekeeper**
Chief Housekeeper hevur ábyrgdina av allari innanborða reingerð kømur, matstovur, handlar o.s.fr. Chief Housekeeper skal hava útbúgving á økinum ella drúgvar royndir. Reingerðingarleiðarin skal tryggja ferðafólkum og manning eitt høgt altjóða tænastustig.

*Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl enskt og norðurlendskt mál. Deildarleiðararnir skulu eisini hava góð samstarvsevni, duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið, og teir skulu hava kunnleika til EDV á brúkarastigi og teldukassaskipanir.*

*Smyril Line bjóðar góð lønar- og starvsfólkaviðurskifti í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Fleiri upplýsingar fáast hjá Andriasi Joensen, manningarleiðara, á tel 34 59 00 ella 34 59 78.*

*Umsóknarfreistin er 1. mars, og umsóknir og CV skulu sendast til: Smyril Line, Jónas Broncksgøta 37, P.O Box 370, FO-110 Tórshavn.*

*Ella við telduposti til: technical@smyril-line.fo*




SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345750
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




# Nú verður meira at lesa um fólk í Sosialinum

### "Nøvn í vikuni" - lesið um vinir og kenningar í Sosialinum

NAVNATEIGUR
*Jan Müller/Magnus Gunnarson*

Er tað nakað, sum blaðlesarum dáma, so er tað at lesa um fólk, ið eitt nú hava ein ella annan merkisdag. Tí er navnatilfar eisini ein so týðandi partur av eitt nú donskum bløðum. Undir heitinum "Dagens navne" ella "Om navne" skriva stóru donsku bløðini, Politiken, Berlingarin og Jyllandsposten dagliga um kendar sum ókendar danir, ið hava onkran merkisdag.

Her í Føroyum er hetta meira tilvildarligt. Og er ein orsøkin til tað, at slík skriving krevur nógva orku av eitt nú bløðunum, sum hava so nógv annað at síggja til í dagliga tíðindaflutninginum.

Sosialurin vil fegin gera meira burtur úr navnatilfarinum og vilja vit harvið eisini ganga ynskjum og áheitanum frá okkara lesarum á møti. Men fyri at hetta skal eydnast, so er neyðugt at okkara lesarar og viðskiftafólk annars geva eina hjálpandi hond tvs. lata okkum frætta, tá onkur í teirra umhvørvi, tað veri seg í familjuni, í grannalagnum ella á arbeiðsplássinum fyllur runt, hevur starvsdag, verður settur í nýtt starv, hevur brúdleypsdag og so mangt annað.

Tað skal vera blaðsins vón, at lesararnir taka undir við hesum tiltaki og eru við til at menna henda táttin í blaðnum saman við okkum. Tað ber til at fylla lep-an út á hesi síðuni og senda hann til okkara sum post, fax ella sum teldupost ella tit bara taka telefonina og ringja.

Hevur onkur eina mynd liggjandi og tit vilja skriva nøkur orð, so sendið okkum hetta. Annars hava vit journalistar og fotografar, sum fegnir fara undir slíkar uppgávur. Fyri at fáa gongd á og fyri at fáa hetta at rigga frá byrjan hevur blaðið sett Magnus Gunnarson til at taka sær av tilfarinum.

Tað er so, at hvønn dag fara nógvar ymiskar hendingar fram, sum bert tey nærmastu ella starvsfelagar vita um. Tað verið seg merkisdagar, rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvsdagar, at fólk eru sett í starv ella eru farin úr starvi. At fólk flyta av landinum ella tey koma heim eftir at hava búð uttanlands í longri ella styttri tíð. Tað kann vera hvat sum helst. Hetta er tó nakað, sum eisini onnur høvdu verið fegin at lisið um.

Tí fara vit sum greitt frá omanfyri at leggja meira orku í hendan partin av tilfari í Sosialinum. Tey, sum vilja gleða vinfólk og kenningar, ið hava ymiskar merkidagar, eru vælkomin at siga okkum frá við at ringja, faxa, senda teldupost ella útfylla lepan "Nøvn í vikuni" og senda okkum hann. Eisini ber til at leggja lepan í brævbjálva í postkassan hjá Sosialinum á Argjum.

At skriva um fólk verður altíð meira viðkomandi, um tað er saman við eini mynd, so lesarin sær hvønn persón talan er um. Vit vænta, at fólk taka væl undir við hesum tátti.



## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran......**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..............................................................................................
Bústaður:.........................................................................................
Bygd/býur:...........................................................Tel:...................................
Evt. arbeiðspláss:..............................................................................

Merkisdagurin er: ...............................................................................

Innsendari: .................................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo

# Blaðfólk nú at hitta alt vikuskiftið

BLAÐTILTAK
*Jan Müller*

Fyri betri at nøkta tørvin hjá okkara lesarum og viðskiftafólki og til tess betur og skjótari at kunna bera út tíðindi og annað blaðtilfar til allar okkara lesarar í blaðnum og á internetinum er Sosialurin nú farin undir eina tænastu við vaktarskipan um vikuskifti.

Tíðindaflutningur og fjølmiðlavirksemi sum heild – og tað kanska serstakliga í Føroyum - er í stóran mun avmarkað til gerandisdagarnar. Í vikuskiftinum liggja føroyskir fjølmiðlar mestsum í dvala. Hetta hevur tó sína náttúrligu og sjálvsøgdu orsøk. Og hon er orka. Ella rættari tørvurin á bæði peningaligari og menniskjansligari orku.

Men nú tøknin og samskiftið er so nógv ment og harvið gevur heilt nýggjar møguleikar fyri ikki minst fjølmiðlarnar - og Sosialurin hevur bygt út sítt virksemi við lokalredaktiónum kring alt landið - sær blaðið nýggjar og óroyndar møguleikar. Ein teirra er at skipa eina vaktarskipan um vikuskiftið tvs. frá fríggjadegi til sunnukvøld. Í tann mun tað er gjørligt vilja vit "dekka" tiltakið, taka myndir ella vit innsavna upplýsingar til morgunreaktiónina, sum so tekur við mánamorgun.

Tað, sum umræður, er at gera meira sjónligt tað, sum fer fram í landi okkara um vikuskiftið. Føroyingar eru so virknir nettupp um vikuskiftið, at tá eigur ein fjølmiðil sum Sosialurin at vera á blettinum.

Í hesum sambandi heita vit á fólk, feløg og felagsskapir kring landið alt, sum eru við í onkrum tiltaki ella vita at siga frá onkrum tiltaki, fundi oø., sum kann hava almennan áhuga at ringja til okkara ella at senda okkum ein teldupost.

Hetta vikuskiftið hevur Solby Eliasen í Klaksvík vikuskiftisvaktina. Hóast stødd í Klaksvík so fevnir vaktararbeiðið allar Føroyar. So er onkur í Sumba, í Skúvoy, í Gásadali, í Tjørnuvík, í Elduvík ella í Havn, sum hevur okkurt hugskotið, tipsið ella søguna, so setið tykkum í samband við Solby: 458686/228479 solby@sosialurin.fo